# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Desmond Tutu og Nelson Mandela eiga sín avgjørda lut í, at tað eydnaðist Suður-Afrika at vinna vertsskapin fyri komandi HM-kappingina. Morðið á Jimmy Mohlala er tó ein beinleiðis andsøgn til friðartilgondina, sum teir báðir hava verið ímyndin av*

*Mynd: Polfoto/AP*

# Suðurafrikanskur fótbóltsleiðari myrdur

**Mánadagin var fyrrverandi varaforsetin í suðurafrikanska fótbóltssambandinum, Jimmy Mohala myrdur uttan fyri heim sítt. Suðurafrikanskir fjølmiðlar halda orsøkina verða, at hann avdúkaði mutur í samband við bygging av leikvøllum til HM í Suður-Afrika**

FÓTBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

44 ára gamli Jimmy Mohala var ein framstandandi politikari, umframt at verða fyrrverandi varaforseti í suðurafrikanska fótbóltssambandinum. Mánadagin var hann skotin uttanfyri heim sítt av trimum byrsumonnum, 33 kilometrar eystan fyri Johannesburg. Sonurin var eisini raktur av kúglum, men hann yvirlivdi.

### Avdúkaði mutur

Suðurafrikanskir fjølmiðlar eru ikki í iva um, at Jimmy Mohala var dripin, tí hann avdúkaði mutur í samband við byggingina av Mbombela-Leikvøllinum, sum skal standa klárur til HM í 2010. Jimmy Mohala var kendur fyri at verða ein rættvísur maður, sum segði frá, um okkurt skeivt var á vási.

Hann gjørdi nógv fyri at rudda upp í lokalpolitikkinum í Johannesburg, og tað gav honum nakrar fíggindar. Freistingin fyri mutri er avgjørt til staðar. Arbeiðarnir, sum fáast við at byggja leikvøllirnar fáa bara umleið tað, sum svarar til 570 danskar krónur um mánaðin. Og hóast príslegan er lág í Suður-Afrika, so er tað ikki nógv at breyðføða familjuna við. Lága Lønarlagið ger tað freistandi hjá fólki at taka við mutri.

### Nógvur kriminalitetur

At tað ikki er vandaleyst at ferðast í Suður-Afrika kom týðiliga fram í einari blaðgrein hjá amerikanska blaðnum, Foreign Policy. Foreign Policy metti Cape Town at verða tann næstmest vandamikla stórbýin í Heiminum, um ein hugsar um øll drápini, sum eru í mun til íbúgvaratalið í býnum.

Higartil hava tó eingi av teimum norðurlendsku uttanríkisráðunum fráráttfólki at ferðast til HM í Suður-Afrika næsta ár.

Mett verður, at suðurafrikonsku myndugleikarnir fara at herða trygdarreglarnir fyri at tryggja, at teir mongu fótbóltsturistarnir kunnu ferðast trygt í landinum, summarið í 2010. Dentur verður tó lagdur á, at tey sum ætla at ferðast til HM í Suður-Afrika, eiga at ferðast í bólkum, og halda seg til tey serligu ferðamálini, sum eru ætlaði útlendsku ferðafólkunum. Ferðast ein einsamallur, so kann tað gerast vandamikið í ávísum økjum.

### Danskt par dripið

Í fjør var eitt danskt par dripið. Hetta vakti afturljóð í Danmark, men suðurafrikonsku ferðamyndugleikarnir royna at vísa á, at 10 miljónir ferðafólk vitja landið, og at tað eru eitt rættiliga lítið tal av fólki, sum kemur út fyri slíkari ræðuligari vanlagnu. Men ein tílík vanlukkulig hending hevur ávirkað donsk ferðafólk, tá tey skulu kjósa sær eitt land at ferðast í.

Tó er líkt til, at fótbóltsfjepparnir ikki verða eins nógvir í tali, sammett við HM í 2006, 2002, 1998 og 1994. Tað hevur eisini gingið tungt við fyrireikingunum til at gera alt klárt til HM-endaspælið í 2010. FIFA hevur eisini hartað Suður-Afrika fyri at fáa gongd á byggingina av leikvøllum.

Morðið á Jimmy Mohlala ger so ikki støðuna hjá Suður-Afrika betri. Í 1980-unum tók FIFA vertsskapin frá Kolumbia, og endin var, at Meksiko gjørdist HM-vertur í 1986. Óváttaðar leysasøgur hava verið frammi, at Ongland, sum hevur nógvar stórar og góðar leikvøllir skal standa til reiðar, sum avloysari. Men eingin innan FIFA hevur vilja váttað hetta. Men tað er ein loysn, sum má umhugsast, um mutrið og morðið ikki fær ein enda í Suður-Afrika.

## Íslendingur skal styrkja MB

**MB, sum komandi árið skal spæla í næst bestu mansdeildini í fótbólti, hevur gjørt sáttmála við íslendska Dáði Már Steinsson. Dáði, sum er íslendingur, er 25 ára gamal, og í fjør var hann partur av liðnum hjá Afturelding, har fyrrverandi KÍ-spælarin, Paul Clapson, taldist millum liðfelagarnar.**

**Sagt verður, at nýggi spælarin vanliga spælir í álopinum ella sum framrættaður miðvallari.**

**-mørk**

## Tottenham heilt nær finaluni

**Tottenham vann tá saman um kom ein tryggan 4-1 sigur á Burnley í fyrru hálvfinaluni í Liga Cup kappingini. Lítið røkist fyri, at Burnley megnar at venda hesum úrslitinum á heimavølli um 13 dagar. Burnley hevur annars havt eina megnar Liga Cup kapping, har teir undir herrópinum "Capitol Punishment" hava sligið út bæði høvuðstaðarliðini, Arsenal og Chelsea.**

**Í 1. hálvleiki vóru tekin um, at Burnley fór at koppa enn einum London-liði. Burnley førdi 1-0 í hálvleikinum við einum máli, sum tann ungi Martin Paterson skoraði, tá eitt korter var farið av dystinum. Tottenham-venjarin, Harry Redknapp gav liði sínum av grovfíluni í hálvleikssteðginum, og vóru Spurs hamskiftir, tá teir komu inn á vøllin aftur. Michael Dawson, Jamie O´Hara, Roman Pavlyuchenko og eitt Burnley-sjálvmál vendu einum 0-1 tapi til ein 4-1 sigur, sum gevur Spurs eitt framúr gott útgangsstøðið til seinnu hálvfinaluna, sum verður á Turf Moor Leikvøllinum tann 19. januar.**

**-heris**

## Rok í City

**Manchester City er ikki vorðið eitt stabilari lið, aftaná at arabisku íleggjarnir frá Abu Dhabi yvirtóku enska felagið.**

**Úrslitini á vøllinum hava verið vánalig, meðan rokið uttanfyri vøllin bara versnar. Brasilsku Elano og Jo hava saman við tí ísraelska spælaranum, Tal Ben Haim royndt at gjørt uppreistur ímóti venjaranum, Mark Hughes, og tað fær nú avleiðingar.**

**Manchester City hevur longu havt ein fund við hesar spælarnar, har teir hava gjørt vart við, at teimum hóvar ikki at verða Manchester City spælarar. Ein annar ónevndur spælari í hópinum hevur klagað Mark Hughes fyri nevndarformanninum, Gary Cook.**

**Ivasamt er um Mark Hughes sleppur at halda fram sum venjari hjá Manchester City. Úrslitini hava verið vánalig, og var botnurin náddur tá liðið tapti 0-3 ímóti Nottingham Forrest á heimavølli í FA Cup kappingini leygardagin. Hóast Manchester City hevur ta størstu fíggjarætlanina í Premier League, so eru teir kortini í stórum vanda fyri at flyta niður í næstbestu deildina.**

**-heris**